# ÁRSFRÁGREIÐING

## Apríl 2024







## HANDILSVINNUFELAGIÐ

# Innihaldsyvirlit

Yvirlit yvir limirnar ........ 4
Frágreiðing frá nevndini ........ 5
Endamál felagsins ........ 7
Nevndin í Handilsvinnufelagnum ........ 8
Í nevndini sita ........ 8
Limatal í Handilsvinnufelagnum ........ 9
Limagjald í Handilsvinnufelagnum ........ 9
Árið ið fór ........ 10
Tiltak um stuldur ........ 10
Søgan um føroysku handlarnar ........ 13
Merkantilu útbúgvingarnar ........ 13
Nýggj pantskipan fyri íløt ........ 14
Hoyringssvar í samband við nýggja kunngerð um fýrverk o.a. ........ 16
Málsligar avmarkingar í lóg um marknaðarføring ........ 16
Støðan nú og frameftir ........ 18
Viðtøkur ........ 19
Viðtøkur handilsvinnufelagsins ........ 19

# Yvirlit yvir limirnar

3-Arin
Alvaró Sp/f
Asile Sp/F
Bakkhús P/F
Balslevs Timburhandil & Byggibúð P/F
Berglon
Bókabúðin
BORG P/F
Colorama, CO. Petur Gaardlykke Sp/F
EAST Sp/f
Effo P/F
Eikin P/F
Eldhús P/F
Elding Sp/F
Føroya Bjór
Føroya Keypssamtøka
Føroya Møblasøla P/F
FTZ - Billutir og Amboð P/f
H. N. J. Bókhandil
Haraldsen P/F
Havnar Timburhandil P/F
Hjá Fróða P/F
HTH Føroyar
Inventar Tænastan Sp/f
Jensen, P/F Carl A.
Jógvan Weihe P/F, Wholesale
John Poulsen Sp/F
Kaj Andreasen & Co
KBI Sp/F
Kemilux
Kósabúðin
Landshandilin P/F
Leif Mohr P/F
Litaval P/F
Magn, Tórshavn
MBM Búrøkt
Nema P/F, Nema
Niels L. Arge Sp/f
Optikbúðin Sp/F
Orkis Sp/f
PE
Pidda, P/F Hjá
Poul Hansen P/F
Poul Michelsen P/F
Radiobúðin
Rit & Rák Sp/f
ROSAH
Shari
Skálkur Holding P/F
Skóhornið Sp/F
Skós - A/L Sp/F
SMS P/F
Solar P/F
Svend Krosstein P/F
Thomas Dam Á Hálsi P/F
Thomas Dam P/F - Ítróttur
Várperla Blómuhandilin
Vest Pack P/F
Zach. Müller Fa.
Brillusmiðjan við Streymin

# Frágreiðing frá nevndini

Farna árið hevur innihildið mál og málsviðgerðir í nevndini og skipað hevur verið fyri tiltøkum fyri limum okkara, eins og onnur ár. Skal man taka nakað serligt framum, so vildi eg sagt at yvirskriftin tó eitur pantskipanin.

Eg gjørdist varðhugur við Føroya Handilsvinnufelag í 2011, tá aðalfundurin fyri árið 2010 var hildin her í húsinum. Hetta var fyrstu ferð eg luttók í hesum forumið. Eg eri ikki heilt greiður yvir smálutirnar, men pant hevur fylt nógv í nevndararbeiðinum hetta farna árinum. Tí vil eg seta pantskipanina sum yvirskrift fyri árið ið fór. Hetta var árið ið fluttið allar partar soleiðis, at Løgtingi í mars í ár hevði fyrstu viðgerð av uppskotinum um nýggja pantskipan. Málsviðgerðin av nýggju pantskipanini hevur verið drúgv og hevur fylgt nógv. Hetta mál hevur stóran áhugað politiskt og í fjølmiðlalandslagnum. Eisini hevur hetta fylt nógv í samfelagnum, har okkara sentrali partur í hesum arbeiði hevur gjørt Handilsvinnufelagið sjónligt millum føroyingar.

Endamálið við einum vinnugreinafelag sum okkara, Føroya Handilsvinnufelag, er at savna og sameina partar í handilsvinnuni har avbjóðingar eru. Okkara virksemið eigur at avspegla gongdina og tørvin í handilsvinnuni. 2023 bleiv sparka ígongd við enn fleiri príshækkanum. Hetta er okkara grundvøllur, ið vit lítla og onga ávirkan hava á. Eg haldi tó at hetta hevur førkað fakliga tænastustøði í summum handlum upp. So man kundi sagt, at neyðin fær nakna kvinnu ella mann at spinna.

Meðan vit hoyra um kríggj, neyð, hjálparsloysið og hungursneyð er ilt hjá okkum í Føroyum at meta um hvørji útlitini eru. Beint nú hevur prísstøði stabilisera seg og hoyrast analytikarar, ið eru spentir uppá nær kurvin man fara at knekka hinvegin aftur.

Sum formaður í Føroya Handilsvinnufelag fegnist eg um, at tann politiska virðingin fyri felagnum er økt munandi. Politiska virðingin fyri okkara felag hevur stóran týdning. Tað skal vera eitt sterkt felag, ikki bara sum partur av vinnulívinum, men nakað sum vinnulívið eisini kennir seg aftur í. Hetta er ikki eitt hvørt vinnugreinafelag, hetta er Føroya Handilsvinnufelag og skal takast í fullum álvara.

Nevndin hevur seinasta árið arbeitt við týðandi málum, tikið mál upp við mynduleikarnar umframt umframt at skipað fyri tiltøkum. Her eru nøkur av teimum tingum, ið hava verið á skrá seinasta árið.

Nevndin hevur havt 6 nevndarfundir umframt aðrar fundir við almennar mynduleikar og almenn feløg.

Eftir nógv ár og fleiri royndir seinni, er líkt til at pantskipanin er við at gerast veruleiki. Uppskot til løgtingslóg- og kunngerð um pantskipan hevur verið til almenna hoyring og er nú lagt fyri tingið. Handilsvinnufelagið hevur í tí sambandi sent inn hoyringsskriv við teimum boðskapum, ið felagið metti vera týdnindarmiklir fyri at skipanin kann verða so effektiv sum gjørligt. Handilsvinnufelagið hevur harumframt verið umboða til arbeiðsfund við Umhvørvismálaráðnum og IRF í samband við

uppskotið. Uppskotið er komið niðan í løgtingið, har fyrsta tingviðgerð var 20 mars. Her kann nevnast, at pantnevndin ið Handilsvinnufelagið hevur víst á sum neyðuga, er tikin við eftir hoyringsskrivið frá felagnum. Sigast kann eisini, at Handilsvinnufelagið var boðið á hoyringsfund í rættarnevndini í samband við tingviðgerðina.

Hóast stórar seinkingar, so er bókin um handlar, ið Helgi Jacobsen fekk til uppgávu at skrivað, nú klár at fara til prentingar. Eftir ætlan verður bókin givin út í heyst. Handilsvinnufelagið vónar, at limirnir taka væl ímóti bókini. Í samband við útgávuna av bókini, er ætlanin at hava eina bókaframløgu í heyst.

Í november 2023 var skipað fyri limatiltaki um stuldur. Tað vóru Mariann Reinert, SSP samskipari hjá Føroya Politi og Tóri Højgaard, stjóri í Dátueftirlitinum, ið høvdu framløgur. Luttøkan til tiltaki var góð, har miðlarnir eisini vístu áhuga fyri tiltakinum. Felagið var m.a. í Góðan morgun Føroyar og greiddi frá um tiltaki og teimum avbjóðingum, ið handilsvinnan hevur.

Í november sendi Handilsvinnufelagið eisini inn hoyringsskriv í samband við nýggju kunngerðina um Fýrverk. Umhvørvismálaráðið, ið varar av kunngerðini, tók tveir av trimum boðskapum til eftirtektar, ið snúði seg um ávikavist seinasta søludag á fýrverki og málslig krøv til merking av fýrverki.

Handilsvinnufelagið hevur í vetur tikið eitt mál upp við brúkaraumboðið viðv. málsligum avmarkingum í lóg um marknaðarføring. Brúkaraumboðið hevur upplýst, at málið verður tikið upp í 2024.

Sum við pantskipanini, so hava merkantilu útbúgvingarnar verið eitt afturvendandi punkt hjá Handilsvinnufelagnum. Søgan er hin sama, har tað framvegis einki er hent í málinum. Hetta er tó framhaldandi eitt punkt, ið Handilsvinnufelagið ynskir avgreitt, so útbúgvingarnar eru á best møguligum góðskustigi.

Sum rosinan í pylsuendanum hava vit eisini fingið nýggjan ráðgeva her í Vinnuhúsinum. Mortan Simonsen, ið hevði verði ráðgevi hjá okkum seinastu árini, fór í starv sum fíggjarfulltrúði í Tórshavnar Kommunu pr. 1 mai, og í hansara stað er komin Alvi Hjelm. Her kann sigast, at samstarvið okkara millum hevur verði sera gott, takk fyri tað og skal eg her veita tær eina almenna "Góða vælkomu".

Eins og víst á í fororðunum, so hevur handilsvinnufelagið verið sjónligt í almenna rúminum í 2023. Hetta er at gleðast um. Handilsvinnufelagið ætlar eisini framhaldandi, at fylgja væl við lógum og reglum, ið kunnu ávirka virksemi hjá føroysku handilsvinnuni. Tað sum er avgerandi er, at Handilsvinnufelagið er eitt virkið og sterkt felag, ið virkar fyri, at tann føroyska handilsvinnan hevur best møguligu karmar at virka undir.

**Tórshavn, tann 24. apríl 2024**

**Bergur R. Dam Jensen**
formaður

# Endamál felagsins

Handilsvinnufelagið er vinnugreinafelag, ið umboðar seráhugamálini hjá føroysku handilsvinnuni.

Limirnir í handilsvinnufelagnum eru framleiðslufyritøkur, heilsølur og vanligir handlar, ið selja alt frá knappanálum, góðgæti, matvørum, klæðum, teldum, maskinum, byggitilfari til tænastuveitingar av ymsum slag.

Handilsvinnufelagið er sostatt meginfelag fyri allar føroyskar handilsfyritøkur, sum selja eitt ella annað, líka mikið um tað eru vørur ella tænastur.

Tað eru serliga fyritøkur, ið virka á føroyska heimamarknaðinum, ið eru limir í Handilsvinnufelagnum.

Handilsvinnufelagið strembar eftir at veita limum sínum best møguliga tænastu.

Málið hjá Handilsvinnufelagnum er at menna og styrkja føroyska handilsvinnu sambært raðfestingunum, sum limirnir í Handilsvinnufelagnum seta á skránna, og tað eru tí limirnir í Handilsvinnufelagnum, ið gera av, hvussu felagið skal ávirka gongdina og menningina av føroyskari handilsvinnu.

Menningin av handilsvinnuni snýr seg m.a. um at vísa á týdningin av handilsvinnuni, soleiðis at fleiri fáa áhuga í at velja handilsvinnuna sum sína yrkisleið.

Hetta verður gjørt umvegis kunningar- og skeiðsvirksemi, men Handilsvinnufelagið er eisini virkin partur í tilgongdini at menna og ávirka útbúgvingarskipanina fyri føroyska handilsvinnu.

Ein onnur týdningarmikil uppgáva hjá Handilsvinnufelagnum er at umboða limir sínar mótvegis politisku skipanini og almennu myndugleikunum, soleiðis at føroysk handilsvinna fær best møguligar karmar at virka innanfyri.

Hetta ger Handilsvinnufelagið m.a. við viðmerkingum um støðu sína, tá ið lógir og reglur, sum kunnu ávirka limirnar í Handilsvinnufelagnum, verða fyrireikaðar.

Handilsvinnufelagið heldur eisini eitt vakið eyga við galdandi lógum og reglum fyri limir sínar. Endamálið við hesum er at vísa politisku skipanini á, hvørjar lógir og reglur treingja til at verða dagførdar og broyttar, soleiðis at føroysk handilsvinna hevur kappingarførar og smidligar karmar at virka innanfyri.

# Nevndin í Handilsvinnufelagnum



*Frá vinstru: Hilmar Sam Lamhauge, Eyðvør Berg, Bergur R. D. Jensen, Claus V. Christensen, Gunnar Mohr.*

Upprunaliga sat Bjarni Bogason í nevndini sum næstformaður fyri tíðarskeiði. Av tí at Bjarni fór í annað starv, valdi hann at taka seg úr nevndini í september 2023. Sum varðalimur tók Claus V. Christensen tí yvir sessin hjá Bjarna.

## Í nevndini sita

- Bergur R. Dam Jensen, *formaður*
- Claus V. Christensen, næstformaður
- Gunnar Mohr, nevndarlimur
- Eyðvør Berg, nevndarlimur
- Hilmar Sam Lamhauge, nevndarlimur

## Limatal í Handilsvinnufelagnum

Í løtuni eru 60 limir í Handilsvinnufelagnum.

Gongdin í limatalinum í Handilsvinnufelagnum frá 2012 til 2024 sæst á myndini niðanfyri.

**Mynd 1: Gongdin í limatalinum í Handilsvinnufelagnum frá 2012 til 2024.**




*Kelda: Handilsvinnufelagið.*

## Limagjald í Handilsvinnufelagnum

Limagjaldið í Handilsvinnufelagnum er ásett eftir, hvussu nógv ársverk eru í viðkomandi handilsfyritøku, sí talvuna niðanfyri.

**Mynd 2: Yvirlit av áseting av limagjaldið í Handilsvinnufelagnum**

| Ársverk | Árligt limagjald | Mánaðarligt limagjald |
|---|---|---|
| 1-3 | 1.200 kr. | 100 kr. |
| 4-10 | 2.400 kr. | 200 kr. |
| 11-20 | 3.600 kr. | 300 kr. |
| 21-50 | 4.800 kr. | 400 kr. |
| 51- | 6.000 kr. | 500 kr. |

*Kelda: Handilsvinnufelagið.*

# Árið ið fór

Niðanfyri er stutt frágreiðing um ymiskt, sum hevur verið á skrá hjá Handilsvinnufelagnum seinasta árið.

## Tiltak um stuldur

Í oktober 2023 skipaði Handilsvinnufelagið fyri kunningartiltaki um stuldur. Tað vóru Mariann Reinert frá Føroya Politi og Tóri Højgaard, stjóri í Dátueftirlitinum, sum høvdu framløgur.




*Mariann Reinert, SSP samskipari hjá Føroya Politi, hevur framløgu um handfaring og fyribyrging av stuldri.*

Mariann Reinert greiddi millum annað frá hvussu handilsvinnan skal handfara stuldur umframt hvussu stuldur kann fyribyrgjast.

Mariann vísti millum annað á, at tað er hent fyri einstøku fyritøkurnar at orða eina mannagongd um, hvussu starvsfólk handfer møguligar støður við stuldri. Eisini er umráðandi, at starvsfólkini í handlunum eru sjónlig og uppmerksom, tí hetta virkar fyribyrgjandi og hevur víst seg at avmarkað talið av handilsstuldri. Mariann vísti eisini á týdningin við innrætting av handlum – Ein óruddiligur handil kann eggja til handilsstuldur, tí órudd signalerer at tað eru óskipað viðurskifti í handlinum.




*Tóri Højgaard, stjóri í Dátueftirlitinum, hevur framløgu um krøv til vakmyndatól sum lið í fyribyrging av stuldri.*

Tóri Højgaard greiddi millum annað frá hvørjar treytirnar eru fyri at brúka vakmyndatól sum lið í fyribyrging av stuldri.

Tóri vísti á, at tá talan er um brúk av vakmyndatólum eru tað ávísar treytir, ið skulu vera uppfyltar. Meginreglan í hesum sambandi er:

- Lóligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni
- Endamálsavmarking
- Dátuminimering
- Rættleiki
- Goymsluavmarking
- Integritetur og trúnaður

Tóri greiddi eisini frá, at ein lóglig viðgerð av vanligum persónsupplýsingum krevur samtykki, avtalu, rættarliga skyldu, verju av altumráðandi áhugamálum hjá skrásetta ella øðrum persóni, samfelagsáhugamál og mynduleikaútinnan ella heimilað áhugamál.




*Alvi Hjelm, skrivari og ráðgevi hjá Handilsvinnufelagnum og Bergur R. Dam Jensen, formaður í Handilsvinnufelagnum, í Góðan morgun Føroyar viðv. stuldri.*

*Kelda: Kringvarp Føroya*

Í samband við tiltaki um stuldur vóru Alvi Hjelm, skrivari og ráðgevi hjá Handilsvinnufelagnum og Bergur R. Dam Jensen, formaður í handilsvinnufelagnum bodnir í Góðan morgun Føroyar, at greiða frá um stuldur og sjálvt tiltaki í felagið skipaði fyri.

Teir løgdu í innslagnum dent á, at sæð í mun til samlaða fólkatali í Føroyum, so er talan bert um ein brøkpart ið fremur handilsstuldur. Hóast hetta, so hevur Handilsvinnufelagið fingið ábendingar um, at handilsstuldurin er vaksandi og var hetta eisini grundin til, at felagið tók avgerð um at skipa fyri einum kunnandi tiltaki fyri limunum um evnið.

## Søgan um føroysku handlarnar




Handilsvinnufelagið gjørdi í 2021 sáttmála við Helga Jacobsen, journalist og rithøvund, um at skriva søguna um føroysku handlarnar.

Arbeiði við bókini hevur ikki gingið sum ætla, har bókin upprunaliga skuldi koma út á heysti 2022. Nevndin í Handilsvinnufelagnum harmast um, at arbeiði ikki hevur gingið sum ætla. Arbeiði er tó komi so mikið langt nú, at miðað verur eftir at geva bókina út á heysti 2024. Í samband við útgávuna av bókinini, er ætlanin at skipað fyri eini bókaframløgu.

Hóast seinkingar í arbeiðinum við bókini, so vónar nevndin í felagnum, at limir felagsins taka væl ímóti bókini, ið gevur innlit í ta ríku handilssøguna, sum vit hava í Føroyum.

## Merkantilu útbúgvingarnar

Handilsvinnan hevur í fleiri ár víst sína ónøgd við føroysku handilsútbúgvingina ella merkantilu útbúgvingarnar sum er. Handilsútbúgvingin er ov lítið praktisk, og fleiri handilslærlingar hava eina fatan av, at teir taka FHS umaftur.

Handilslærlingar mangla tí veruligar avbjóðingar við verkætlanum í síni útbúgving.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er umboðað í Yrkisútbúgvingarráðnum, har Eyðvør Berg, nevndarlimur í Handilsvinnufelagnum, situr sum umboð fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag. Yrkisútbúgvinarráðið hevur latið politisku skipanini tilmæli, har mælt verður til at fáa eina betri kobling millum teori og praksis í merkantilu útbúgvingunum.

Tað er neyðugt at gera broytingar í faksamansetiningini og undirvísingarháttinum, sum skal vera meira case grundað.

Broytingarnar kunnu hava við sær, at skúlagongdin fer at fara frá 7 vikum samlað til 9-10 vikur.

Tilmælt verður t.d., at skúlagongdin endar við uppgávu. Ikki sum í dag, har tað kemur fyri, at uppgávan skal skrivast fleiri mánaðir eftir lokna skúlagongd, tí kravt verður, at uppgávan skal skrivast í seinasta partinum av útbúgvingini.

Einki er hent síðan Yrkisútbúgvingarráðið lat politisku skipanin síni tilmæli, men hesa tíðina eru broytingar gjørdar í donsku útbúgvingarskipanini, sum kunnu hava avleiðingar fyri handilslærlingar, ið ætla til Danmarkar at taka skúlan.

## Nýggj pantskipan fyri íløt

Á heysti 2021 fór ein arbeiðsbólkur undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum undir eina tilgongd at fyrireika tilmæli til nýggja pantskipan á einnýtisíløt.

Arbeiði hevur verið drúgt, men er nú komi so mikið langt, at uppskot til løgtingslóg- og kunngerð um pantskipan fyri íløt nú hevur verið til almenna hoyring og er lagt fyri tingið. Áðrenn almennu hoyringina bjóðaði Umhvørvismálaráðið saman við IRF tí til kunningarfund fyri limunum í Handilsvinnufelagnum. Nógvir limir møttu til kunningarfundin, ið hevði til endamáls at kunna um lóggávuna. Harumframt hevði IRF framløgu, ið kunnaði limirnar um, hvussu skipanin skal virkað, tá lóggávan er sett í gildið.



*Høgni Iversen, fulltrúði í Umhvørvismálaráðnum og Wenche Bech Waag, KT-verkætlanarleiðari hjá IRF, til kunningarfundin um pantskipanina, tann 9. november 2023.*

Í samband við almennu hoyringina, sendi Handilsvinnufelagið inn eitt hoyringsskriv. Fyrst er at siga, at Handilsvinnufelagið fegnast um, at pantskipanin nú tykist at gerast verulleiki. Tó metir Handilsvinnufelagið, at ávísir manglar eru við skipanini, ið eru týðandi fyri, at skipanin fer at virka so effektivt sum gjørligt.



VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Handilsvinnufelagið

Tórshavn, tann 5. januar 2024

Umhvørvismálaráðið
umhvorvi@umhvorvi.fo

**Ummæli av uppskotið til løgtingslóg og kunngerð um pantskipan fyri íløt**
Handilsvinnufelagið hevur fingið uppskot til løgtingslóg og kunngerð um pantskipan fyri íløt til hoyringar. Handilsvinnufelagið hevur viðgjørt uppskotið og hevur hesar viðmerkingar.

Fyrst er at siga, at Handilsvinnufelagið fegnast um, at pantskipanin nú tykist at gerast veruleiki. Hetta hevur verið ein long tilgongd, og Handilsvinnufelagið heldur hetta vera eitt týðandi stig á leiðini, sum fer at gagna umhvørvinum, handilsvinnuni og borgaranum.

Handilsvinnufelagið tekur yvirskipað undir við uppskotinum, men metir samstundis, at uppskotið hevur ávísar manglar, ið eru týðandi fyri, at skipanin fer at virka so effektivt sum gjørligt.

**Ein pantnevnd eigur at verða sett**
Við heimild í uppskotinum til løgtingslóg leggur uppskotið til kunngerð upp til, at L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, IRF, skal umsita, reka og hava eftirlit við pantskipanini. Samstundis leggur uppskotið upp til, at innflytarar og framleiðarar skulu gjalda eitt rakstrargjald fyri hvørt innflutt ella framleitt ílat. Hetta rakstrargjaldið skal vera við til at fíggja pantskipanina. Uppskotið leggur harafturat upp til, at IRF ásetur árliga rakstrargjaldið uttan aðrir partar hava nakað at siga, tó at landstýrisfólkið endaliga skal góðkenna ásetta rakstrargjaldið.

Handilsvinnan er - um nakar - dugnalig til at effektivisera seg. Hetta kemst av, at ein áhaldandi effektivisering í handilsvinnuni er neyðugt og ein grundleggjandi fortreyt fyri framhaldandi at vera kappingarfør. Handilsvinnufelagið mælir tí til, at tað í sambandi við pantskipanina verður sett ein nevnd, ið skal vera við til at tryggja, at skipanin til eina og hvørja tíð er effektivt skipað og virkar sum best.

Tað er handilsvinnan, ið dagliga skal fyrihalda seg til og gera sítt til, at pantskipanin er so smidlig sum gjørligt, so at føroyski borgarin ómakaleyst kann sleppa av við alt sítt pant á einum staði. Handilsvinnufelagið metir tí tað vera sera umráðandi, at praktiska fyriskipanin av pantskipanini er so effektiv sum gjørligt. Í eini effektivari pantskipan liggur eisini, at skipanin til eina og hvørja tíð kann halda kostnaðin av skipanini so langt niðri sum gjørligt.

Handilsvinnufelagið skilir tí ikki, hví ein pantnevnd ikki er partur av uppskotinum. Handilsvinnufelagið hevur í fleiri umførum gjørt Umhvørvismálaráðið varugt við tørvin á eini slíkari nevnd. Handilsvinnufelagið mælir tí staðiliga til, at ein pantnevnd verður partur av uppskotinum, so at allar fortreytir fyri einari effektivari pantskipan eru til staðar. Handilsvinnufelagið mælir í hesum sambandi til, at ein slík nevnd verður umboðað av teimum aktørum í handilsvinnuni, sum í gerandisdegnum fara at hava við pantskipanina at gera. Ein slík nevnd eigur tí at hava umboð fyri innflytarar, framleiðarar og sølustøð við. Hetta fyri at tryggja,

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

at pantskipanin til eina og hvørja tíð er so effektiv sum gjørligt og at skipanin er so kostnaðareffektiv sum gjørligt.

**Bensinstøðir eiga í vissan mun at verða undantiknar**
Í grein 8, stk. 7, í uppskotinum til kunngerð eru listaði tey sølustøð, ið eru undantikin móttøkuskyldu av panti. Her kunnu m.a. nevnast matstovur, barrir, kaffistovur, móttøkur á hotellum o.o..

Tað tykist ikki sum, at uppskotið leggur upp til, at bensinstøðir eru fevndar av undantøkunum. Grein 8, stk. 7, nr. 7, fevnur tó um sølustøð, sum vanliga ikki ella bara í sera avmarkaðan mun selja matvørur og bara selja heilt fáar pantvørur, sum t.d. ambodshandlar, timburhandlar og venjingarmiðstøðir. Handilsvinnufelagið mælir í hesum sambandi til, at bensinstøðir eisini verða fevndar av undantøkunum.

Veruleikin er tann, at fleiri av bensinstøðunum kring landi eru sera lítlar og hava tí ógvuliga avmarkaða pláss. Hjá hesum smáu bensinstøðunum er ógjørligt at taka ímóti panti, tí tær hava ikki neyðuga plássið. Handilsvinnufelagið skal gera vart við, at vinnan tekur pantskylduna í álvara og vil fegin, á teimum støðum har tað er gjørligt, røkja sína móttøkuskyldu. Tá tað á summum bensinstøðum er ógjørligt at húsa pantinum, eiga bensinstøðir tí at hava møguleika fyri at verða undantiknar móttøkuskylduni.

...nufelagið

...am Jensen, Formaður

...n Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Víst var á, at tað er umráðandi fyri eina vælvirkandi skipan, at ein pantnevnd verður sett. Sannleikin er, at tað er handilsvinnan, ið dagliga skal fyrihalda seg til og gera sítt til, at pantskipanin er so smidlig sum gjørligt, so at føroyski borgarin ómakaleyst kann sleppa av við alt sítt pant á einum stað. Handilsvinnan hevur tí stóran áhuga í, at praktiska fyriskipanin av pantskipanini er so effektiv sum gjørligt.

Handilsvinnan er - um nakar - dugnalig til at effektivisera seg. Hetta kemst av, at ein áhaldandi effektivisering í handilsvinnuni er neyðugt og ein grundleggjandi fortreyt fyri framhaldandi at vera kappingarfør. Í hoyringarsvarinum mælti felagið tí staðiliga til, at ein pantnevnd verður partur av uppskotinum, so at allar fortreytir fyri einari effektivari pantskipan eru til staðar. Her var mælt til, at tað í pantnevndini verða umboð fyri framleiðarar, innflytarar og sølustøðum, so at allir aktørar í skipanini eru umboðaðir.

Víst var eisini á tørvin at fáa bensinstøðirnar undantiknar móttøkuskylduni av pantið. Fleiri av bensinstøðunum kring landi eru sera lítlar og hava tí ógvuliga avmarkaða pláss. Hjá hesum smáu bensinstøðunum er ógjørligt at taka ímóti panti, tí tær hava ikki neyðuga plássið. Handilsvinnufelagið gjørdi samstundis vart við, at vinnan tekur pantskylduna í álvara og vil fegin, á teimum støðum har tað er gjørligt, røkja sína móttøkuskyldu. Tá tað á summum bensinstøðum er ógjørligt at húsa pantinum, mælti felagið til, at bensinstøðir tí at hava møguleika fyri at verða undantiknar móttøkuskylduni.

Í svarinum hjá Umhvørvismálaráðnum til hoyringsskrivið hjá Handilsfelagnum gjørdist greitt, at pantnevndin verður partur av uppskotinum. Eftir hoyringina er lógarteksturin er tí broyttur soleiðis, at ein pantnevnd verður sett, ið verður ráðgevandi og kann gera av, hvussu IRF byggir upp, umsitur og rekur pantskipanina. Í svarinum hjá Umhvørvismálaráðnum verður eisini gjørt greitt, at um uppskotið verður samtykt, verða samráðingar tiknar upp við Handilsvinnufelagið um pantnevndina.

Eftir ætlan skal atkvøðast um lógaruppskotið í mai 2024. Síðani ganga 11 mánaðir til skipanin kemur í gildið. Hetta merkir, at pantskipanin eftir ætlan verður galdandi frá 1. apríl 2025.

## Hoyringssvar í samband við nýggja kunngerð um fýrverk o.a.

Handilsvinnufelagið fekk í oktober 2023 uppskot til nýggja kunngerð um fýrverk o.a. til ummælis. Uppskotið hevði til endamáls at fáa meiri skipaðar reglur í lag viðv. fýrverki. Handilsvinnufelagið sendi inn eitt hoyringssvar, har tað serliga vóru tríggir boðskapir, ið vóru førdir framm.

Uppskotið til kunngerð legði upp til, at fýrverk skal vera merkt við einum seinasta søludegi. Fýrverk hevur ikki ein seinasta søludag, og tí er hetta ikki møguligt hjá einum føroyskum innflytara at handhevja. Fýrverk er merkt við einum framleiðslu ári, og um goymt undir røttum umstøðum, kann frývverki vera gott í fleiri ár. Handilsvinnufelagið mælti í hesum sambandi til, at ásetingin um seinasta søludag var strikað.

Uppskotið legði harafturat upp til, at merking av fýrverki skal vera á føroyskum, donskum, norskum ella svenskum. Sannleikin í dag er tann, at flest øll ung eru líka stinn um ikki stinnari í enskum enn í donskum og kanska serliga í mun til norskt og svenskt. Fyri eisini at framtíðartryggja at kunngerðin er samtíðarhóskandi mælti Handilsvinnufelagið til, at enskt var tikið við í teimum málum, sum merkingin kann skrivast á.



Handilsvinnufelagið

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Umhvørvismálaráðið
Umhvorvi@umhvorvi.fo

Tórshavn 22. november 2023

**Ummæli av uppskotið til kunngerð um fýrverk o.a.**

Handilsvinnufelagið hevur fingið uppskot til kunngerð um fýrverk o.a. til hoyringar. Handilsvinnufelagið hevur viðgjørt uppskotið og hevur hesar viðmerkingar.

Innleiðandi er Handilsvinnufelagið fegið um, at tað koma meiri skipaðar reglur um fýrverk, ið skal handfarast við stórsta varsemi. Uppskotið hevur tó viðurskifti í sær, ið eftir okkara meting ikki kunnu handhevjast umframt viðurskifti, hvørs endamál ikki tykist at verða grundgivið fyri.

**Seinasti søludagur finst ikki**

Uppskotið til kunngerð leggur upp til, at fýrverk skal vera merkt við einum seinasta søludegi. Fýrverk hevur ikki ein seinasta søludag, og tí er hetta ikki møguligt hjá einum føroyskum innflytara at handhevja. Fýrverk er merkt við einum framleiðslu ári, og um goymt undir røttum umstøðum, kann frývverki, um neyðugt, vera gott í fleiri ár.

Tá seinasti søludagur ikki verður merktur á fýrverk, sum í stórstan mun verður framleitt í Kina, er tað ógørligt hjá einum føroyskum innflytara at handhevja hetta. Um ásetingin er sett inn fyri at tryggja, at vandamikið fýrvek ikki verður selt grundað á aldur, so er hetta ein goymsluspurningur og ikki ein spurningur um lokadagin á fýrverki, tí ein slíkur finst ikki í dag. Handilsvinnufelagið mælir tí til, at ásetingin í § 5, stk. 1, nr. 6 verður strikað.

**Málslig krøv til kunning og merking**

Uppskotið leggur harafturat upp til, at merking av fýrverki skal vera á føroyskum, donskum, norskum ella svenskum. Sannleikin í dag er tann, at flest øll ung eru líka stinn um ikki stinnari í enskum enn í donskum og kanska serliga í mun til norskt og svenskt.

Fyri eisini at framtíðartryggja, at kunngerðin er samtíðarhóskandi mælir Handilsvinnufelagið til, at enskt verður tikið við í teimum málum, sum merkingin kann skrivast á. Hetta eisini tí, at ásetingin í stóran mun avmarkar innflytarar í at innflyta fýrverk frá londum, ið brúka enskt í merkingini av fýrverki, sum eisini er eitt brúkt mál í handilsvinnuni sum heild.

**Søla av fýrverki**

Í mun til søludagar av fýrverki leggur uppskotið upp til, at søla av brúkarafýrverki bert kann vera í tíðarskeiðinum 28. desember til og við 31. desember. Hetta er ein stytting við einum degi í mun til tað sum er galdandi í dag. Hetta merkir, at seljari av fýrverki hevur fýra dagar og í summum førum tríggjar dagar at selja brúkarafýrverk, um ein av hesum døgum fellur á ein sunnudag. Tað eru í uppskotinum greiðar ásetingar fyri, nær fýrverk kann verða brúkt uttan loyvi og tí kann hetta ikki verða grundgevning fyri styttingini.

Handilsvinnufelagið veit tí ikki hvat endamálið er við at stytta dagarnar har møguleiki er fyri at selja fýrverk. Um støði verður tikið í Danmark, sum kunngerðin í stóran mun lenar seg uppat, so er fýrverkssøla loyvd frá 15. desember til og við 31. desember, samstundis sum tað eisini eru greiðar reglur fyri nær brúk av fýrverki er loyvt. Handilsvinnufelagið mælir tí til, at tíðarskeiði har søla av fýrverki uttan serligt loyvi er loyvd, verður longd.

Vinarliga

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Eisini legði uppskotið upp til, at søla av brúkarafýrverki bert kann vera í tíðarskeiðinum 28. desember til og við 31. desember. Hetta er ein stytting við einum degi í mun til tað sum er galdandi í dag. Handilsvinnufelagið vísti millum annað á donsku lóggávuna, ið loyvir fýrverkssølu fra 15. desember til og við 31. desember. Handilsvinnufelagið mælti tí til, at tíðarskeiði fyri loyvdari fýrverkssølu var longt.

Tveir av trimum boðskapum hjá Handilsvinnufelagnum vóru tiknir til eftirtektar. Ummhvørvismálaráðið broytti orðingina í ásetingini um seinasta søludag, so hetta einans verður galdandi fyri fýrverk, ið hevur ásett ein seinasta søludag. Harumframt var enskt tikið við sum mál, ið merkingin av fýrverki kann skrivast á. Umhvørvismálaráðið tók ikki boðskapin um søludagar til eftirtektar við tí grundgeving, at jú longri tíðarskeið fýrverk er tøkt, jú størri eru sannlíkindini fyri, at fýrverki verður brúkt uttanfyri loyvda tíðarskeiði at skjóta fýrverk.

## Málsligar avmarkingar í lóg um marknaðarføring

Nevndin í Handilsvinnufelagnum fekk í oktober 2023 eina áheitan frá einum limi í Handilsvinnufelagnum, har víst var á málssligar trupulleikar í lóg um marknaðarføring. Talan er um

ásetingina í grein 7 a, í løgtingslóg um marknaðarføring. Eftir ásetingini skulu lýsingar og lýsingartilfar, sum er beinleiðis ætla brúkarum í Føroyum, verða á føroyskum.

Orðingin í lógini sum hon stendur í dag ger, at nógvar av teimum fyritøkum, ið hava nethandlar, ikki hava møguleika fyri at handhevja kravið um føroyskt sum mál. Talan er er serliga um sjálva nágreiningina av vøruni, ið ofta er skrivað á ørðum málið enn føroyskum. Hetta tí, at allýsingarnar av vørunum í stóran mun koma frá útlendskum veitarum og verða leypandi dagførdar. Tá talan samstundis er um, at fyritøkurnar í nógvum førum hava fleiri túsund vørur á nethandilinum, er sera torført um ikki ógørligt at umseta allar allýsingar til føroyskt. Um hetta so skuldi verið gjørt, hevði hevði verið eitt ógvuliga umsitingarliga tungt arbeiði, ið mest sannlíkt hevði avmarkað hugin fyri at hava nethandil.

Lógin um marknaðarføring var viðgjørd í løgtinginum í 2008, har grein 7 a í lógini kom inn umvegis eitt broytingaruppskot. Viðmerkingin[1] til broytingaruppskoti var orðað soleiðis:

"*Ásetingin inniber, at teksturin í øllum lýsingum og lýsingartilfari, sum eru gjørt fyri at ávirka brúkarar í Føroyum, skal vera á føroyskum. Ásetingin er ikki grundað á nakra ávísa fatan av, hvat ið er føroyskt mál. Lýsingartekstir eru oftani á gerandismáli, og skulu lániorð og annað vanligt útlendsk árin á føroyskt tískil ikki útihýsast. Ásetingin skal ikki skerja tað listarliga frælsið hjá teimum, sum gera lýsingar.*"

Ásetingin um føroyskt sum mál er innførd í eini tíð, har nethandil ikki var eins frammkomi, sum tað er í Føroyum í dag. Handilsvinnufelagið metir ikki, at omanfyristandandi viðmerking til broytingaruppskotið hevur havt til endamáls at avmarkað eitt nú allýsingar av vørum hjá føroyskum nethandlum. Handilsvinnufelagið metir ikki, at eitt nú ein nágreining av eini vøru á einum nethandli, har eitt viðskiftafólk av sínum eintingum hevur trýst á vøruna kann metast at vera við ávirkan fyri eyga, sum viðmerkingin til broytingaruppskotið legði upp til.

Nevndin í Handilsvinnufelagnum hevur tikið málið upp, og hevur í tí sambandi sent eitt skriv til Brúkaraumboðið, har nevndin hevur víst á omanfyristandandi sjónarmið. Brúkaraumboðið hevur í tí sambandi upplýst, at málið verður tikið upp í 2024.

[1] https://www.logting.fo/mal/mal/?id=4585.

# Støðan nú og frameftir

Handilsvinnufelagið strembar alla tíðina eftir at fáa fleiri limir í felagið, tí málið hjá Handilsvinnufelagnum er at menna og styrkja føroysku handilsvinnuna, bæði úteftir og millum limirnar í felagnum.

Til at røkka málinum krevst eitt sterkt og sjónligt Handilsvinnufelag við nógvum limum.

Í løtuni eru 60 limir í Handilsvinnufelagnum, og tað er í minna lagi, um felagið skal kunna vísa seg sum eitt sterkt og sjónligt felag at umboða og verja áhugamálini hjá føroyskari handilsvinnu.

Handilsvinnufelagið fer at halda somu kós sum frameftir, har føroyska handilsvinnan alsamt verður gjørd meira sjónlig í almenna rúminum, umframt at skipa fyri tiltøkum av ymsum slag fyri limir felagsins.

Handilsvinnufelagið fer framhaldandi at leggja stóran dent á at veita best møguliga tænastu og ráðgeving til limir sínar.

Einki mál er ov lítið og einki mál er ov stórt at venda sær til Handilsvinnufelagið við.

Um Handilsvinnufelagið ikki setir seg føran fyri at avgreiða ella loysa málið, so vísir felagið til rætta viðkomandi at taka sær av málinum.

Tað verður framvegis ein týdningarmikil uppgáva hjá Handilsvinnufelagnum at umboða limir sínar mótvegis politisku skipanini og almennu myndugleikunum annars, soleiðis at føroysk handilsvinna fær best møguligar karmar at virka innanfyri.

Handilsvinnufelagið heldur tí eitt vakið eyga við lógaruppskotum og galdandi lógum og reglum fyri limir sínar. Endamálið við hesum er at vísa politisku skipanini á, hvørjar lógir og reglur treingja til at verða dagførdar og broyttar, soleiðis at føroysk handilsvinna hevur kappingarførar og smidligar karmar av virka innanfyri.

# Viðtøkur

## Viðtøkur handilsvinnufelagsins

**Kapittul 1**

**Navn, heimstaður og endamál**

**§ 1.** Navn felagsins er Handilsvinnufelagið. Heimstaður felagsins er Tórshavn.

**§ 2.** Endamál felagsins er at savna føroyska handilsvinnu í ein vinnufelgsskap at útinna felags áhugamál.

Í virki sínum skal felagið skipa fyri felags menning í vinnugreinini, bæði í virkjunum, og av teimum karmum virkað verður undir. Millum limirnar skal felagið stuðla undir samskifti og førleikamenning, og úteftir virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu, herundir.

- Menna og ávirka útbúgvingarskipanina fyri handilsvinnuna
- Betra um rekruttering av arbeiðsmegi til vinnugreinina
- Menna handilsvinnuna gjøgnum kunning og skeið
- Greina og vísa á týdningin av handilsvinnuni
- Ávirka og menna karmarnar fyri at reka handilsvinnu
- Hoyring av lóggávu
- Lobbyvirksemi

**Kapittul 2**

**Limaskapur**

**§ 3.** Í felagnum kunnu handilsfyritøkur gerast limir.

Umsókn um limaskap í felagnum verður send umsitingini av felagnum. Nevndin ger ásetingar fyri møguligar treytir fyri limaskapi.

Við innliming í felagið skrivar fyritøkan undir at halda lógir felagsins soleiðis, sum tær eru ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar.

Limur kann siga seg burturúr felagnum við 6 mánað freist.

Limur, sum ikki hevur greitt limagjald kann koyrast út úr felagnum. Henda útkoyring loysir tó ikki viðkomandi lim frá gjaldskyldu síni. Felagið kann krevja limagjald inn umvegis innheinting.

## Kapittul 3

## Limagjald

**§ 4.** Limagjaldið verður ásett á hvørjum ársaðalfundi, fyri eitt ár ísenn. Fult limagjald verður eisini goldið fyri innlimingarárið.

Limagjaldið fellur til gjaldingar tann 1. mai á hvørjum ári. Tó skulu nýggir limir hava rindað limagjald fyri at fáa atkvøðurætt á aðalfundi sama ár sum innliman.

Felagsins inntøkur verða at nýta til rakstur, sum nevndin, ið stendur aðalfundinum til svars, heldur verða neyðugar. Skuldi felagnum verið tørvur á meiri peningi til at fremja ávís mál, hevur aðalfundurin heimild til at útvega neyðuga fígging við tilskotum frá limunum. Eisini kann aðalfundurin til útvegan av slíkum peningi leggja eykagjald á limirnar í hvørjum kalendaraári, tó ikki størri enn tað, ið svarar til tey vanligu limagjøldini.

## Kapittul 4

## Aðalfundurin

**§ 5.** Aðalfundur felagsins hevur hægsta ræðið í øllum viðurskiftum felagsins.

Rætt at koma á aðalfund hava allir limir felagsins.

Ein og hvør, sum hevur rætt til at koma á aðalfund, kann koma fyri annan við sama fundarrætti, um hesin limur hevur fingið fulltrú til tess. Limur kann skrivliga geva øðrum persóni fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.

**§ 6.** Vanligur aðalfundur verður hildin á hvørjum ári í apríl mánað. Lýst verður til vanliga aðalfundin minst 14 dagar frammanundan. Nevndin ásetir tíð og stað fyri aðalfundin og avger á hvønn hátt hann verður lýstur.

Á aðalfundinum er henda skrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Framløga av limalista
3. Frásøgn nevndarinnar frá farna ári
4. Framløga av grannskoðaðum roknskapi
5. Val av nevnd og tiltakslimum
6. Val av grannskoðara
7. Áseting av limagjaldi
8. Ymiskt

Allar avgerðir verða samtyktar við vanligum meiriluta. Atkvøðubýtið er ásett eftir starvsfólkatalinum hjá limunum soleiðis:

Limirnir hava eina atkvøðu fyri upp til 3 ársverk
millum 4 og 10 ársverk tvær atkvøður
millum 11 og 20 ársverk tríggjar atkvøður
millum 21 og 50 ársverk fýra atkvøður
fyritøkur við fleiri enn 51 ársverkum fimm atkvøður.

Atkvøðugreiðsla á aðalfundinum, ið viðvíkur lógarbroyting, kann bert verða samtykt við ¾ av atkvøðunum. Er fundurin ikki viðtøkuførur, kann verða lýst til nýggjan fund, og ræður tá vanligi meiriluti úrslitinum, uttan mun til fundarluttøku.

**§ 7.** Eykaaðalfundur verður at halda, tá í minsta lagi 2 nevndarlimir, ella minst ¼ av limunum skrivliga krevja tað. Lýst verður til eykaaðalfund á tann hátt og so langa tíð frammanundan, sum nevndin ger av.

## Kapittul 5

## Nevndin

**§ 8.** Felagið verður stjórnað av eini 3 ella 5 manna nevnd. Aðalfundurin velur annaðhvørt ár 1 ella 2 og annaðhvørt ár 2 ella 3 limir í nevnd felagsins, fyri 2 ár ísenn.

1 ella 2 tiltakslimir verða valdir á hvørjum aðalfundi.

Um nevndarlimur tekur seg úr nevndini í úrtíð, tekur fyrst valdi tiltakslimurin við nevndarsessinum.

Miðað verður eftir, at nevndarlimir og tiltakslimir umboða tær ymisku handilsgreinirnar og landið so væl sum tilber.

Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni beint eftir aðalfundin.

Nevndin hevur minst fýra nevndarfundir um árið.

Gerðabók verður førd frá nevndarfundum.

## Kapittul 6

## Tekning/ábyrgd

**§ 9.** Nevndarformaðurin teknar felagið. Nevndin hevur heimild at seta fólk til dagligu leiðslu felagsins, og kann veita slíkum umboðsfulltrú.

Til at upptaka lán, seta í veð, selja ella keypa fasta ogn krevst aðalfundarsamtykt og undirskrift á viðkomandi skjøl av nevndarformanni.

Felagið ábyrgdast bert við teirri til eina og hvørja tíð í felagnum verandi ogn. Í samband við virksemi felagsins, áliggur tað ikki limum og nevnd nøkur fíggjarlig ábyrgd.

## Kapittul 7

## Grannskoðan

**§ 10.** Roknskapur felagsins verður grannskoðaður av einum av aðalfundinum valdum grannskoðara.

Roknskaparárið er kalendaraárið.

Roknskapurin skal liggja til skjals á skrivstovu felagsins, tá lýst er til aðalfund.

## Kapittul 8

## Avtøka av felagnum.

**§ 11.** Felagið kann verða tikið av við ¾ av teimum greiddu atkvøðunum eftir samtykt av tveimum aðalfundum, og mugu í mesta lagi verða lidnir 14 dagar millum fundirnar.

Skuldi felagið verið tikið av, verða ognir felagsins nýttar, soleiðis sum aðalfundurin tekur avgerð um.

Samtyktar á eykaaðalfundi 02. juli 1997.
Broyttar á eykaaðalfundi 06. juni 2001.
Broyttar á eykaaðalfundi 24. august 2011.
Broyttar á eykaaðalfundi 1. mars 2016.
Broyttar á eykaaðalfundi 30. apríl 2019
Broyttar á aðalfundi 17. juni 2020.

## HANDILSVINNUFELAGIÐ

Adressa
Óðinshædd 7
Postboks 1038

Telefonnummar
309900

Teldupostur
alvi@industry.fo

Fartelefon
739908

Heimasíða
www.industry.fo